FØROYA REIÐARAFELAG

Hoyringsskriv til løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (arbeiðsgevarapartur longdur)

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku, har arbeiðsgevaraparturin verður longdur, er lagt fyri løgtingið, og Føroya Reiðarafelag hevur hesar viðmerkingar. Í fyrsta lagi verður átalað, at lógaruppskot verða løgd fyri tingið uttan at avvarðandi partar hava havt høvi at siga sína hugsan í eini hoyring frammanundan. Broytingin í dagpengaskipanini hevur við sær, at útreiðslur verða fluttar frá landskassanum yvir á privatar arbeiðsgevarar, og tí krevja slík uppskot altíð gjølliga viðgerð.

Í stuttum hevur uppskotið við sær, at arbeiðsgevarin nú skal rinda fyri fýra teir fyrstu fráverudagarnar hjá arbeiðstakara ístaðin fyri tveir teir fyrstu dagarnar, sum núverandi lóg sigur. Arbeiðsgevaraparturin verður sostatt tvífaldaður úr tveimum upp í fýra dagar, og talan verður sostatt um munandi hægri útreiðslur hjá fleiri arbeiðsgevarum.

Í 2016 avtók løgtingið lóg um sjúkratrygd til fiskimenn, og henda skipan varð løgd undir lóg um dagpengar, soleiðis at bert ein skipan skuldi vera galdandi fyri allar løntakarar. Reiðarafelagið tók tá undir við at gera hesar skipanir einfaldari, hóast hetta merkti øktar útreiðslur fyri føroysk reiðarí. Hetta tí at reiðaríini tá fingu eina nýggja skyldu at rinda fyri 1. og 2. sjúkradag. Gamla lógin um sjúkratrygd fyri fiskimenn hevði ikki slíkar ásetingar, og tí kostaði skipanin ikki reiðaríum nakað áðrenn 2016.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið í 2016 varð staðfest, at uppskotið hevði ta avleiðingar fyri reiðaríini, at 1. og 2. fráverudagur skuldi endurrindast Almannaverkinum, um fiskimenn verða sjúkir ella skaddir umborð ella í sambandi við arbeiði umborð. Mett varð tá, at talan varð um 600 túsund krónur tilsamans í einum ári. Bert fýra ár seinni verður hetta tíðarskeiðið nú longt upp í fýra dagar. Eingin meting er gjørd av, hvussu nógv hetta uppskotið fer at kosta reiðaríunum, men talan verður væntandi um eina munandi hækking í útreiðslum hjá føroyskum fiskiskipum til hesa skipan.

Hetta merkir, at í einum fýra ára tíðarskeiðið er arbeiðsgevaraparturin hjá reiðaríum farin úr ongum upp í fýra dagar, har reiðaríini síðani skulu rinda. Talan er sostatt um munandi versnaðar umstøður hjá føroyskum reiðaríum, og hetta kann gerast ein dyggur smeitur hjá smærri reiðaríum, ið frammanundan hava tungan rakstur. Føroya Reiðarafelag tekur ikki undir við uppskotinum um at leingja arbeiðsgevarapartin, og víst verður eisini til hoyringsskrivið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag í sama máli.

Føroya Reiðarafelag, 30. oktober 2020

Stefan í Skorini, stjóri

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo